# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Hygg, hvat eg havi gjørt við Picasso. Tað er hol á.*

*Las Vegas-ríkmaðurin Steve Wynn*

# Kinesarar stika markið



*Tveir norðurkoreanskir hermenn við Dandong-ána á markinum millum Norðurkorea og Kina*

*Mynd: Reuters*

**Teir seinastu dagarnar hava túsundtals kinesiskir hermenn sett píkatráð upp á markinum við Norðurkorea**

Fyri bara fáum døgum síðani var ikki ein einasti kinesiski hermaðurin at síggja við norðurkoreanska markið, men nú er øðrvísi. Vesturlendsk tíðindafólk greiða frá, at fleiri túsund kinesiskir hermenn eru í ferð við at seta píkatráð fram við markinum, og at endamálið er at forða flóttafólki at koma úr Norðurkorea, skuldi støðan har versnað.

Samstundis eru kinesiskir hermenn og tollarar farnir at kanna hvønn einasta lastbil, sum fer um norðurkoreanska markið. Hetta verður gjørt samsvarandi ST-samtyktini um tiltøk í móti Norðurkorea, tí landið hevur roynt eina kjarnorkubumbu. Sambært teimum vesturlendsku tíðindafólkunum tykist eftirlitið kortini ikki vera serliga neyvt. Tollararnir hyggja eftir lastini, men teir kanna ikki, hvat er í eskjunum og kassunum.

Norðurkorea hevur iki serliga stóran samhandil við onnur lond. Í fjør keypti landið vørur fyri einar 27 milliardir krónur. Av tí kom helmingurin úr Kina, og ein stórur partur fer eftir marknabrúnni um ánna Dandong. Tað er eisini har, teir kinesisku tollararnir hava fingið sær støð nú.

Markið millum Norðurkorea og Kina er 1400 kilometrar langt, og altjóða tíðindastovurnar skriva, at nógvastaðni eru kinesiskir hermenn í ferð við at seta píkatráð fram við markinum. Hinvegin er ógreitt, hvussu væl tolleftirlitið virkar har.

## Leita eftir smábarni

Amerikanska løgreglan leitar eftir einum 10 mánaðar gomlum drongi, sum er horvin.

Teir sosialu myndugleikarnir í statinum Kentucky høvdu tikið drongin frá mammuni, men seinasta vikuskiftið slapp hann heim at vitja mammuna saman við einari kvinnu, sum arbeiddi hjá myndugleikunum. Men mánadagin varð kvinnan funnin deyð, og tann 10 mánaðar gamli drongurin var ikki at finna.

Men mamma drongin og sambúgvi hennara vóru heldur ikki at finna, og løgreglan ber ótta fyri, at tey hava tikið drongin við sær. Tí eru tann 33 ára gamla Renee Terrel og tann 23 ára gamli Christopher Wayne Luttrell eftirlýst í Kentucky og fleiri øðrum statum, skrivar AP.

Løgreglan vil ikki siga, um kvinnan, sum ansaði dronginum, var myrd, ella hvussu hon var deyð.

## Rendi albogan ígjøgnum Picasso

Steve Wynn skuldi selja tann dýrasta málningin hjá Picasso, men so rendi hann albogan ígjøgnum málningin.

Fyri níggju árum síðani keypti Las Vegas-ríkmaðurin Steve Wynn tann kenda málningin "Dreymurin", sum Picasso málaði í 1932.

Tá rindaði Steve Wynn smáar 300 milliónir krónur fyri málningin, men nú um dagarnar gjørdi hann av at selja hann, tí hann hevði fingið eitt boð upp á heilar 850 milliónir krónur. Hann var so væl nøgdur við boðið, at hann bjóðaði nøkrum vinmonnum at síggja málningin inni á skrivstovu síni í Las Vegas. Men Steve Wynn hevur eina eygnasjúku, so ávirkar sjónina, og hann varnaðist tí ikki, at hann kom ov nær málninginum, so hann rendi annan albogan ígjøgnum løriftið.

Nú hevur keyparin tikið boðið aftur, og Steve Wynn noyðist uttan iva at rinda nógv fyri umvælingina.

**STUTT SAGT**

### Fólkaatkvøða um fosturtøku

Í Portugal hava tey eina sera stranga lóg, tá tað snýr seg um fosturtøku, men í morgin fer tjóðartingið at taka støðu uil, um fólkið skal sleppa at siga sína hugsan um at gera lógina eitt sindur linari. Eftir galdandi lóg kunnu kvinnur ikki fáa fosturtøku, sjálvt um tær eru vorðnar við barn undir neyðtøku, ella um lívið hjá kvinnuni er í vanda. Í 1998 var fólkaatkvøða um broytingar, men tá var luttøkan so lítil, at málið datt burtur.

### Nokta at berjast

Teir seinastu dagarnar hevur sudanski stjórnarherurin verið fyri tveimum lemjandi ósigrum í bardaganum við uppreistrarmenninar í Darfur-landspartinum, skrivar ST-sendimaðurin Jan Pronk. Fleiri hundrað hermenn eru falnir ella tiknir til fanga, og herurin hevur tikið seg aftur. Jan Pronk skrivar eisini, at nógvir stjórnarhermenn nokta at fara í bardaga, og at stjórnin hevur svarað aftur við at geva fleiri generalum sekkin.

### Jarðskjálvti

Í Ný Sælandi eru tey von við jarðskjálvtar, og nú hava jarðfrøðistovnarnir aftur skrásett ein. Miðdepilin í skjálvtanum var góðar 450 fjórðingar í ein útsynning úr teirri syðru oynni, og skjálvtin bleiv máldur til 5,8 á Richterstiganum. Einki er frætt um skaða. Ný Sæland er millum avstralska landgrunnin og kyrrahavsplátuna, og har eru ofta jarðskjálvtar.